*Fegnir sambandsmenn í útvarpshúsinum í gjárkvøldið. Edmund Joensen er júst komin norðan av Oyrarbakka - Johan Dahl, næstformaður Sambandsfloksins tekur ímóti saman við Kaj Leo Johannesen, floksformanni*
Myndir: Jens Kristian Vang



**Allir eygleiðarar í donskum politikki væntaðu eitt siðaskifti í donskum politikki. Tað lá í kortunum, eftir at nýggi danski flokkurin Ny Alliance trein inn á pallin. Ávirkanin hjá Piu Kjærsgaard og Dansk Folkeparti skuldi steggjast. Danskur politikkur skuldi dragast nærri miðjuni. Burtur frá tí fremmandafíggindaliga, sum hevði komið Danmark í ringt orð úti í stóra heimi. Nærri einum globaliseringsvinarligum politikki, sum fekk fleiri kend vinnulívsfólk at stilla upp fyri Ny Alliance ella aftanfyri fyri flokkin sum almennir stuðlar. Siðaskiftið varð av ongum, tí føroyingar valdu sambandsmannin Edmund Joensen á danating. Danir fara at spyrja, hvør ið hesin politikarin av Oyri við tí hulisliga Mona Lisa-smílinum er, sum heldur lív í tí høgrasnaraða Danmark. Føroyingar – og ikki minst sambandsfólk - mugu spyrja, hvat ið politisku Føroyar eru drignar uppí við treytaleysa stuðlinum hjá sambandsfólkatingmanninum til VKO-stjórnina. Her skal verða nortið við tað seinna**

# Edmund 90. maður hjá donsku stjórnini

ANALYSA

*Jógvan Mørkøre, samfelagsfrøðingur*

Jokarin í føroyskum politikki eisini jokari í donskum politikki.

Tað kann tykjast at vera søgunnar spei, at størsti jokarin í føroyskum politikki í nýggjari tíð, løgtingsformaðurin Edmund Joensen, sum uttan fyrilit fyri samgonguavtalu og samgongusamstarv tveitti landið út í politiskt rok og tvídrátt í spurninginum um valdømini, skal geva sín treytaleysa stuðul sum 90. maður til eina samgongu uttan so frægt at umhugsa, hvønn politikk hann gevur sín stuðul til. Eitt samband ekr ivaleyst. At Edmund fekk so dyggan stuðul um alt landið, hevur ivaleyst samband við hansara leiklut í valdømismálinum; hann hevur fingið nógvar atkvøður á hasari kontuni. Og grundina til at hann endar sum avgerandi atkvøðuna undir VKO-stjórnini kenna vit somuleiðis: Sambandsflokkurin endaði við at geva Venstre sín stuðul einaferð tíðliga í farnu øld sum úrslit av einum taktiskum talvi millum seg og Sjálvstýrisflokkin um stuðul í donskum politikki. Og har hevur hann verið síðani, hóast hann stundum hevur havt meira til felags við aðrar danskar flokkar, eitt nú Konservativt Folkeparti. Treytaleyst.

### Kríggj við Edmundsa atkvøðu?

Tá ið orðaskiftið var fyri í løgtinginum um at skipa Føroyar sum eitt valdømi helt Hergeir Nielsen retoriskt fyri, hví tey, ið vóru so altrá eftir at tryggja, at suðuroyingar skuldu kunna atkvøða fyri norðoyingum og øvugt, ikki eisini vissaðu sær, at danski veljarin í Gilleleje fekk høvi at seta krossin fyri einum valevni heilt aðrastaðni í danska ríkinum á einum fólkatingsvali. Nú hevur løgtingsformaðurin møguleikan at gera alt ríkið til eitt valdømi, men ger neyvan nakað fyri at fáa hetta í lag. Hinvegin so eru aðrir spurningar, ið Edmund Joensen kann koma at taka støðu til sum tungan á vágskálini. Í seinnu hólmgonguni millum Helle Thorning-Schmidt og Anders Fogh Rasmussen spurdi javnaðarforkvinnan forsætisráðharran beinleiðis, um hann hevði farið í kríggj aftur við bert einari atkvøðu í meiriluta. Anders Fogh-Rasmussen smoygdi sær undan at svara við vanligu undanførslunum um ræðuleikarnar hjá Saddam Hussein osfr., hóast hon spurdi upp aftur fleiri ferðir. Nú er Edmund Joensen avgerandi atkvøðan, so tað er ikki meira enn rímiligt at spyrja hann spurningin, ið Venstre-formaðurin lat vera ósvaraðan. Edmund Joensen er framvegis formaður í einum løgtingi, ið hevur vent sær ímóti krígsførsluni í Iraq, eins og hansara egni flokkur hevur gjørt tað. Danska kongaríkið er framvegis við í einum kríggi í Iraq, hóast hermenninir eru tiknir út. Og onnur kríggj hótta, eitt nú mótvegis Iran. Vil Edmund Joensen vera berandi atkvøðan undir slíkum? – Tað er neyvan nakar ivi um, at danir, sum eru ímóti krígnum í Iraq, og sum í alt størri mun vilja sleppa sær út úr Afghanistan, fara at spyrja, hvønn rætt eitt umboð fyri Føroyar, sum ongar hermenn ella hernaðarútgerð lata til nakað sum helst, kann hava at senda ungar danir í kríggj. Soleiðis reint moralskt.

### Skattalættar ella ikki?

Í miðdeplinum fyri mesta partin av danska orðaskiftinum upp undir fólkatingsvalið var spurningurin um skattalættar ella skattesteðg. Edmund Joensen umboðar ein føroyskan flokk, sum til seinasta løgtingsval gjørdi spurningin um skattalætta til høvuðsevnið. Síðani hevur ein av høvuðsarkitektunum aftan fyri uppskotið hjá Sambandsflokkinum, Magni Laksáfoss, sum í dag umboðar flokkin sum fíggjarmálaráðharri, mælt til at steðga á við fleiri skattalættum. Flokkurin hevur tikið undir við honum við tilvísing til, at neyðugt er at reka ein skynsaman og ábyrgdarfullan politikk. Tað var ikki sørt, at flokkurin fann sær ein meira sosialkonservativan profil við denti á bleytu virðunum og vælferð. Hvat ger Edmund Joensen so í eini líknandi støðu í Danmark? Tað er ikki óhugsandi, at Fogh Rasmussen finnur uppá at gera eina semju við Konservativa Fólkaflokkin, ið trokar á í hesum spurningi, sum inniber skattalætta fyri serliga summar skattaborgarar búsitandi í Danmark. Hóast danski búskapurin kann tykjast yvirupphitaður eins og hin føroyski. Atkvøður Edmund Joensen tá við Venstre fyri skattalætta í Danmark, samstundis sum hann gongur ímóti skattalætta í Føroyum? Í Bretlandi var herfyri eitt áhugavert orðaskifti um skotsku ávirkanina í enskum politikki. Politikarar úr Konservativa Flokkinum reistu spurningin, um tað var rímiligt, at parlamentslimir úr Skotlandi kundu atkvøða um mál í bretska parlamentinum, sum bert høvdu við borgarar í Onglandi at gera, tá ið skotska heimastýrið hevði fingið ræði á tilsvarandi málsøkið. Kann Edmund Joensen loyva sær at atkvøða í málum um skatt og vælferð, ið bert hava avleiðingar fyri borgarar í Danmark? Soleiðis reint moralskt.

### Flóttafólk og útlendingar.

Verður tað nakað, ið kemur at standa eftir, tá ið VKO-stjórnin einaferð fer í søguna, so er tað fyri sín morgíriga flótta- og útlendingapolitikk. Fleiri politikarar úr Venstre og Konservativt Folkeparti vendu flokkum sínum bakið í andstygd fyri tí, flokkarnir høvdu latið seg drigið til av Dansk Folkeparti, og stovnaðu Ny Alliance saman við Naser Khader. Nú risikera hesi fólk, ið m. a. rýmdu úr Venstre fyri at skapa eitt trýst frá miðjuni í donskum politikki, at hetta fyri teimum ivaleyst stóra stig at taka verður til fánýtis, tí ein sambandsmaður kemur inn og gevur Anders Fogh Rasmussen carte blanche til at halda fram við sama politikki og skáka sær undan ávirkan frá Ny Alliance. Tær avgerðir, ið eru tiknar á hesum øki, tær avgerðir, ið verða tiknar, og tær avgerðir, sum kundu verið tiknar, men sum kanska ikki verða tiknar orsakað av Edmundi Joensen, hava allar týdning fyri Føroyar. Vinnuhúsið hevur leingi eftirlýst ein meira opnan politikk á hesum økinum. Samtak hevur eftirlýst eina manssømiliga viðferð av útlendskari arbeiðsmegi. Hvussu vil Edmund Joensen tryggja sær, at hesi ynski verða gingin á møti og samstundis vera avgerandi atkvøðan, ið forðar Ny Alliance at ávirka V og K burtur frá O í hesum málinum?